# TILVERUNNAR GOLD

Framførslan á the Duchess Theatre í London av THE BIRTHDAY PARTY eftir Harold Pinter er ein listarligur stórsigur



Eftir Hanus Kamban

HUGSA TÆR ein frítíðarbý í Onglandi, onkustaðni úti við strondina. Í einum fátæksligum húsum, har til ber at hýsa fremmandafólki, búgva hjúnini Petey og Meg. Petey hevur til arbeiðis at vara av teimum legustólum, har ferðafólk kunnu sita ella slanga sær niðri við sjóvarmálan. Meg er húsmóðir, fjálgar um mannin og um teirra einasta búfasta gest - tann einsliga og arbeiðsleysa Stanley, ið nærkast teimum fjøruti.

Tá ið tjaldið fer upp, situr Petey og fær sær morgunmat, meðan Meg gongur honum til handa. Samrøðan hjúnanna millum er innantóm, men ikki óvinarlig. Tað er týðiligt, at Meg hevur størri áhuga fyri sínum gesti enn sínum manni. Stanley er ikki morgunmaður, húsfrúan ótolnast meira og meira, til endans kann hon ikki bara sær, men fer upp á kamarið hjá gestinum og mest sum rívur hann av songini. Nøkur opinbering er tó ikki í tí harra, sum nú trínur inn á pallin - skitin, frísutur, órakaður og við skjúrtuni hangandi uttan fyri buksurnar. Ikki tí, hansara fesjuta útsjónd rímar við umhvørvið, eina lítið hugnaliga stovu við grønmynstrutum tapeti og slitnum, bíligum innbúgvi.

Tá ið Petey er farin til arbeiðis, tekur eitt spæl seg upp millum gest og húsfrúu, eitt slag av koksan, har tey orð ið verða søgd ofta merkja tað øvugta av teirra innihaldi, við sjónskum kynsligum undirtónum. Stanley minnir mest um ein gamlan drong, sum hevur damlað sær burtur úr samfelagsins vandasjógvi og inn á deyðavatn - og har funnið eina tiltaksmammu, sum hann kann arga og samstundis fáa trygd og ugga frá.

YVIR TEIRRI heilagu grøvini valdar enn friður. Oidipus og Iokaste, í lurvutari East End-útgávu, sleppa at hugna sær í náðum heima við hús, meðan (um vit toyggja samanburðin) Laios kongur røkir sítt ábyrgdarstarv sum stólavørður niðri á sandinum. Hesin Petey tykist vera komin beinleiðis úr onkrari søgu eftir Herman Bang, nógv er ikki um hann, men hann hevur, vísir tað seg seinni, rankari rygg enn nakar annar í hesum leiki.

Longu tíðliga sníkir ein feril av órógv seg inn í leikin. Áðrenn hann fer til arbeiðis, fortelur Petey fyri konu síni, at hann hevur hitt tveir harrar niðri á strondini, sum sóknast eftir taki yvir høvdið. Tá ið Meg ber Stanley hesi tíðindi, skilst straks, at nú verður brátt annar, og álvarsamari, táttur tikin upp.

Eg veit ikki, hvussu onnur føla ella hugsa í eini slíkari støðu, men sjálvur havi eg hug at grípa um stólin, tá ið Pinter førir greipuna Goldberg-McCann inn á pallin. Tað er sum at sita í flogfari og brádliga dumsa niður í eitt lufthol, ið er sum ein sloka - líkst niður í helviti. Ikki tí, at síggja til eru hesir feðgar ikki øðrvísi enn teir streymlinjaðu mótajunkarar, tú hittir á almennum móttøkum.

McCann, tretivu ár, í bleikgrønum klædningi og við grønum slipsi, sær kanska eitt sindur snubbutur út, ikki maður, tú soleiðis ósjálvrátt flýgur um hálsin á. Men Goldberg, harafturímóti, er - hóast farin um tey hálvthundrað - ein rættur sjarmørur, spelkin, brosandi, sloktur, tungan sum smør, í ljósagráum klædningi við prangandi strípda slipsi. Hesin fínibeiggin kundi fyri tí verið italienskur mafiubossur, ráðharri í Hvíta Húsinum ella forseti í Usbekistan.

Eftir at nøkur - at síggja til høvisk - inngangsorð eru fallin, skilst, at hesir harrar eru ikki ørindaleysir, og enn minni at spæla við. Tað er Stanley, teir vilja koma í takholt við, hetta veit Stanley, angistin seyrar inn í hann og drepur inn í hvønn blett og hvørja rivu í stovuni, og var tað ikki so, at replikkirnar hjá Pinter - líkasum tær hjá Shakespeare ella Ibsen - goyma í sær deldir av komiskum møguleikum, hevði ivaleyst mangur hyggjari slept sær á dyr, tá ið Stanley av álvara kemur fyri rættin.



Harold Pinter saman við Vaclav Havel, í Prag 1988. Blaðungur las Pinter skaldsøguna Der Prozess eftir Franz Kafka. Sjónleikurin The Birthday Party (Føðingardagsveitslan) speglar aftur brigdir úr bókini



Henry Goodman sum Goldberg, fyri fullum seglum í the Duchess Theatre

Avhoyringin av Stanley - har spurningarnir, hann verður undirdíktur í, gerast alsamt meira høpisleysir og samstundis fáa dám av vaksandi grimd - er dømi um djúpt ímyndaðan skaldskap, eina lýsing av andaligari terrorismu, sum neyvan hevur sín líka í heimsins bókmentum.

MEN HVØRJA misgerð hevur hesin neyðar maður gjørt? Hví verður Stanley avhoyrdur og ákærdur? Lyklar til svar upp á hesar spurningar finna vit í persónleikunum hjá Goldberg og McCann, í teirra málburði og tilsipingum.

McCann er íri, og av tilsipingum til t.d. Oliver Blunkett, sum var írskt halgimenni, og Drogheda, har Cromwell í 1649 á blóðugan hátt beindi fyri írskum uppreistrarmonnum, skilst, at hann umboðar írskan katólskan átrúna. Goldberg, hinvegin, sum tosar um *gefilte fish* og pyntar sín slokta, afturhorvandi orðafloym við øðrum jiddiskum heitum, umboðar jødadóm av Cockney slag. Báðir venda í heilum aftur til trúnna, slektina, mammuna, fortíðina, til tað halga og óspilta. Teir umboða sostatt patriarkatið, tolkað á jesuittiskan hátt, í tveimum monoteistiskum útgávum.

LEIKURIN ER sostatt, innan fyri eitt ávíst mark, eitt neyvt realistiskt verk. Vit fáa enntá ábendingar um, at Goldberg og Stanley hava kenst fyrr. Men samstundis er greitt bæði at evnisviðgerðin fatar um annað enn átrúnaðarligan yvirgang, og at leikurin í øðrum parti víðkar seg út um tað veruleikakenda og verður allegoriskur og lutvís surrealistiskur.

Hesir garparnir, sum hava leitað Stanley upp, eru á ein hátt ímyndir, holdgerðir av tankans ella samvitskunnar røringum. So fjaðursárur hann annars er, er Stanley á ein hátt ein hetja. Hann hevur gjørt ta stóru misgerð at vilja definera seg sjálvan, skapa sínar egnu reglur - ella óreglur - og liva sambært teimum. Hann er ein, ið noktar at akta, normbrótari, konformitetsrýmingur. Vit, sum upplivdu sekstiárini, vita, at eina slíka leið gongur tú ikki órevsaður. Tá ið *The Birthday Party* varð framførdur á Lyric Hammersmith í London í 1958, tók kritikarin Harold Hobson soleiðis til í sínum ummæli í *Sunday Times:*

*Okkurt er í tíni fortíð - sama ger hvat - sum fer at fáa teg aftur. Hóast tú rýmir út í heimsins fjarastu avkrókar og krógvar teg í tí ókendasta høli í tí mest burturgloymda býi, so er ein dagin møguleiki fyri, at tveir menn fara at koma. Teir fara at leita eftir tær og tú sleppir ikki burtur. Og onkur fer eisini at leita eftir teimum. Ræðsla er allastaðni.*

Eftir er at nevna tað mest sjálvsagda tematiska brigdið í hesum leiki: hansara beinraknu og framskygdu politisku staðfesting. Tá ið tann ójavni dysturin um valdið millum øðrumegin Stanley og hinumegin feðgarnar Goldberg og McCann seinast í 50-árunum losnaði undan dulvitsvæðingini hjá einum vreiðum unglingi úr Thistlewaite Road 19 í East End, lýsti